# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**
14. des. fingu Laila í Jógvansstovu og Magni Berg, Aarhus, tvíburardreingir. Ein vigaði 2400 gr og var 47 cm. Hin vigaði 2070 gr og 44 cm langur.

27. desember fingu Anna Áarberg og Símun Gutti Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3500 gr.

28. desember fingu Susan Djurhuus og Jóhann Wolles, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3900 gr.

28. desember fingu Andrea og John Arnfinn Reynstind, Sørvágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4900 gr.

28. desember fingu Bjørga og Pól Hentze, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

29. desember fingu Áki og Erla Mortensen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4400 gr.

31. desember fingu Elsebeth og JónKári í Brekkuni, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3650 gr.

31. desember fingu Karin Dahl, Hoyvík og Jóannes Jensen, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3700 gr.

31. desember fingu Barbara S. Norðbúð og Don Ey. Joensen, Skáli, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4150 gr.

**Brúdleyp**
Leygardagin 5. januar 2008 giftas Tanja Anthoniussen og Arnhold Sigurðsson Simonsen, Fuglafjørður. Vegna sjúku verður ikki opið hús aftaná vígsluna.

Leygardagin 5. januar kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Katrin Holm Joensen og Hans Jákup Hansen. Veitslan verður í Pálsstovu kl. 19.00 fyri innbodnum.

**90 ár**
Sunnudagin 6. januar fyllir Anna Danielsen, av Strondum, búsitandi á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík 90 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

Mánadagin 7. januar 2008 verður Margretha Hansen á Saltnesi 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á Vesturskyn á Toftum frá kl. 18.00.




# Hjørdis í Útvarpinum deyð



Seinasta dagin í gamla árinum, mánadagin 31. desember 2007, andaðist Hjørdis Massdóttir í Havn, 82 ára gomul. Jarðarferðin var úr Vesturkirkjuni fríggjadagin og hagani til Nólsoyar, har hon ynskti at verða grivin.

Hjørdis var ættað úr Nólsoy. Foreldrini vóru Maria, f. Jacobsen í Búð, og Mads Thomsen í Túni, bæði úr Nólsoy.

Hjørdis gjørdist kend, tá hon sum fyrsti kvinnuligi útvarpsvertur legði rødd til regluligu tíðindasendingarnar hjá Útvarpi Føroya, sum byrjaðu 6. februar í 1957. Hon var eisini fyrsta fólk, sum var sett í fast starv í Útvarpi Føroya og kom skjótt at starvast saman við Axel Tórgarð presti, sum gjørdist fyrsti útvarpsstjórin. Hjørdis dugdi sera væl at málbera seg í útvarpinum, og øll kendu hennara vøkru og kláru kvinnurødd.

Tað var eftir at løgtingið samtykti endaliga uppskotið hjá Edward Mitens, landsstýrismanni við mentamálum, um at seta á stovn útvarp í Føroyum tann 27. januar 1956, at landsstýrismaðurin boðsendi Hjørdis Thomsen, sum hon tá varð nevnd, um at koma í starv sum tíðindafólk á nýggju útvarpsstøðini.

## Sum ung til Havnar

Hjørdis var málsliga væl fyri og var útbúgvin í fremmandum málum við korrespondentførleika í enskum, týskum og fronskum, umframt at hon eisini var stinn í føroyskum.

Á heysti 1956 var Hjørdis hjá Danmarks Radio og kunnaði seg um útvarpsarbeiði. Hon var sett at gera tað fyrireikandi arbeiðið, eisini á tekniska økinum, áðrenn útvarpið kundi byrja at senda. Hjørdis arbeiddi í Útvarpinum frá 1956 til 1959.

Sum bert 12 ára gomul fór Hjørdis til Havnar at ganga í skúla. Hon hevði ikki familju at búgva hjá í Havn, men mátti leiga seg inn. Eitt tíðarskeið búði hon á Vertshúsinum. Samfelagið var ikki innrættað til bygdanæmingar. Hóast frástøðan millum Nólsoynna og Havnina ikki er stór, slapp hon bert út til Nólsoyar til høgtíðirnar og feriur. Onkuntíð kom pápi hennara við báti inn til Havnar eftir henni.

Hjørdis tók studentsprógv í 1945, og er millum tey fyrstu, sum fingu hetta prógv í Føroyum og ikki minst tær allar fyrstu kvinnurnar.

Eftir at Hjørdis varð útlærd sum korrespondentur, kom hon heim aftur og arbeiddi eina tíð í Føroya Banka. Avbjóðingarnar vóru avmarkaðar, lítið fremmandamál annað enn danskt og lønin so vánalig, at hon valla rakk til húsaleigu. Hjørdis fór tí niður aftur til Keypmannahavnar at arbeiða sum korrespondentur hjá Brøste, til hon seinni byrjaði í Útvarpinum.

Eftir starvstíðina í Útvarpinum fekk Hjørdis starv í Landsstýrinum og var skrivari hjá løgmanni og varaløgmanni, til hon gjørdist heimagangandi, ímeðan børnini vóru smá.

Tá yngsta barnið var 10 ár, fór Hjørdis á Dómarakontórið ar arbeiða sum skrivari í eini tvey til trý ár, til hon miðskeiðis í 1970-unum fekk í boðið at taka við starvi á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum. Har treivst hon sera væl og arbeiddi m.a. við at finna og føra kartotek yvir orð og vendingar í føroyska málinum, sum enn ongantíð vóru skrásett. Hetta starv røkti hon í 17 ár, til hon noyddist at leggja frá sær vegna aldur, hóast hon sjálv ynskti at halda fram, til hon varð 70 ára gomul.

## Hjørdis í útvarpinum

Hjørdis giftist við Hera Jensen, lærara og fyrrverandi skúlastjóra á Venjingarskúlanum, sum er ættaður úr Froðba. Tey búsettust á trøðni hjá Niels Rein, abba Hera í móðurættini. Venjingarskúlanun bleiv seinni bygdur á trøðni við síðuna av.

Børnini vóru fimm í tali: Mass Ingi, sum doyði í 2006, Jákup Egil, Maria, Bárður og Katrin, sum øll búgva í Havn. Ommubørnini hjá Hjørdis eru 9 í tali.